Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður:

# - Kann ikki góðtakast

**Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, sigur, at tað kann ikki góðtakast, at eitt nú dagtilboð og døgurðaútkoyring til pensionistar heldur uppat, tí at Almannastovan skal spara 44 prosent á rakstrarstuðlinum til umsorganararbeiði. Hann ætlar sær tí at finna ein loysn í málinum**

SPARINGAR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, sigur, at tað kann als ikki góðtakast, at rakstrarstuðulin til umsorganararbeiði verður skorin við 44 prosentum, so at millum annað eini 150 pensionistar ikki fáa døgurða koyrdan út. Hann ætlar sær at koma við eini frágreiðing í málinum*

*Savnsmynd*

Hans Pauli Strøm viðgongur, at tað er ógvuliga seint í árinum, at teir ymisku stovnarnir, ið bjóða ymisk dagtilboð til pensionistarnar, hava fingið boð um, at teirra rakstrarstuðul frá Almannastovuni er skerdur við 44 prosentum, og hann heldur eisini, at tað ikki kann góðtakast.

### Kannar hvat kann gerast

Landsstýrismaðurin bað um eina frágreiðing í málinum, og nú verður tað tikið upp í Almanna- og Heilsumálastýrinum, hvussu hesin trupulleikin kann loysast.

- Nú brúki eg ta neyðugu tíð upp á málið, ið skal til, og so kemur ein útmelding. Eg royni at kanna, hvørjar møguleikar eg havi í málinum. Eg havi við vilja ikki vilja úttalað meg í málinum, tí eg havi ikki verið førur fyri at svara vegna væntandi innlit í málið. Tí vildi eg ikki bara koma við einum "sludur fyri ein slatur", sigur Hans Pauli Strøm.

Hans Pauli Strøm sigur seg verða samdan við teimum, ið finnast hvassliga at avgerðina um at skerja í rakstrarstuðlinum til umsorganararbeiði, og hann vónar, at ein loysn verður funnin í næstum.

Trupulleikin er tann, at játtanin til umsorganararbeiði er 4,8 milliónir í ár eins og í fjør, men samstundis eru talið av tilhaldsplássum økt munandi. Tískil verður væl minni í part, og hetta ger, at neyðugt verður at spara í rakstrarstuðlinum.

Landsstýrismaðurin viðgongur, at øktu tilhaldsplássini ikki kemur bak upp á landsstýrið, men tað hevur bara ikki eydnast at fáa hægri játtan, sigur Hans Pauli Strøm.

Sambært landsstýrismanninum broytti fíggjarnevndin hjá løgtinginum játtanina til umsorganararbeiði, soleiðis at hon fór frá at verða ein lógarbundin játtan til at verða ein rakstrarbundin játtan. Um hetta ikki var gjørt, hevði eingin trupulleiki verið, tí so hevði tað var eitt lógarkrav, at fullur stuðul var veittur til umsorganararbeiði, sjálvt um farið var út um játtanina.

Hans Pauli Strøm sigur, at væntandi kemur hann við einari frágreiðing um málið fyrrapartin í dag, og vónandi hevur hann eina loysn upp á trupulleikan til ta tíð.

Bill Justinussen, Miðflokkurin:

# - Ótrúliga óheppið

**Í Miðflokkinum eru tey skelkað av tíðindunum um, at stuðulin til umsorganararbeiði er skerdur við nærum eini helvt, og tí verða tilboðini til tey gomlu skerd munandi**

SPARINGAR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sjálvur er Bill Justinussen staddur uttanlands í summarfrí í løtuni, men hann hevur tó roynt at fylgt við í føroysku miðlunum, hvat gongur fyri seg her á landi. Í fartelefonini sigur Bill, at sparingarnar eru eitt úrslit av, at tað er farið at stramma fíggjarliga í Føroyum.

### Ikki javnaðarpolitikkur

Bill Justinussen sigur, at tað er ógvuliga sjáldsamt, at javnaðarflokkurin velur tey gomlu, tá ið sparast skal, men hann heldur, at hetta er prísurin, ið má gjaldast fyri at verða í samgongu við fólkaflokkinum.

- Nú koyra vit við undirskoti á fíggjarlógini, men framvegis verður skattalætti latin til høgu lønirnar, og tað má takast inn aftur onkra aðrastaðnis. Fólkaflokkurin vil skerja almennu útreiðslurnar, og er ivaleyst eitt dagligt stríð hjá Hans Paula Strøm at fáa fólkaflokkin við í sínum arbeiði, sigur Hans Pauli Strøm.

Løgtingslimurin hjá miðflokkinum sigur tað verða eitt poltiskt og ikki eitt umsitingarligt mál, at rakstrarstuðulin verður skerdur, tí landsstýrismaðurin ræður suverent yvir játtanini.

### Mugu fáa meiri fyri pengarnar

Sjálvur heldur Bill Justinussen, at strukturin í almannaverkinum er ov dýrur, og at ov lítið fæst fyri pengarnar.

- Tað er alt ov nógv smá kongaríkir í almannaverkinum. Vit hava alt ov nógvar leiðarar, varaleiðar og onnur, sum brúka alt ov nógva tíð upp á fundarvirksemi, skeiðvirksemi og ferðing, ístaðin fyri at tey vóru úti í markini, har tørvurin er størstur, sigur Bill Justinussen.

Bill Justinussen heldur tað verða eina gongda leið, at minni tíð verður brúkt í fundarhølum og á skúlabonki, tí tað kostar ov nógv og gongur út yvir brúkaran.

*Løgtingsmaðurin hjá miðflokkinum, Bill Justinussen, sigur, at tað eru alt ov nógvir leiðarar og varaleiðarar í almennaverkinum, sum brúka alt ov nógva tíð upp á fundarog skeiðsvirksemi, ístaðin fyri at verða úti í markini og gera nakað til nyttu*

*Savnsmynd*



# Ikki nýggj sparing

**Tað er ikki nøkur nýggj sparing, sum Lágargarður hevur fingið álagt, ið ger, at búfólkið á stovninum noyðist at liggja longri í seingini**

SPARINGAR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Marjun Smith, leiðari á Lágargarði, sigur, at trupulleikin er tann, at mánakvøldið var fundur við tey avvarðandi hjá búfólkunum á Lágargarði, har greitt var frá stramma fíggjarliga karminum á stovninum, og hvørjar avleiðingar hetta fór at hava.

Fundurin og tíðindini um avleiðingarnar bresta so saman við sparingarnar, sum Almannastovan hevur gjørt í rakstrarstuðlinum til umsorganararbeiði, og tí halda tey flestu kanska, at Lágargarður júst hevur fingið boð um at spara eyka á sjálvum røktarøkinum, men so er ikki.

### Ómøgulig játtan

Leiðslan á Lágargarði fekk longu í vetur at vita, hvørjar fíggjarkarmar stovnurin hevur at arbeiða undir, men trupulleikin er tann, at karmarnir eru so at siga ógjørligir at halda seg innan fyri, um arbeiði hjá stovninum skal røkjast til fulnar.

Sum nevnt í gjár kunnu búfólkini á Lágargarði vænta at liggja meira í songini, og harvið koma í størri vanda fyri at fáa liggisár og lungnasjúkur, men tað hevur einki við sparingarnar í rakstrarstuðlinum at gera, men tí at fíggjarkarmarnir á røktarøkinum eru so strammir.